

# Ymist við jólahandlinum

**Í Miðbýnum í Havn og í Klaksvík gekk jólahandilin trekt, men SMS letur væl at, og á Skálafjørðinum siga tey frá óvanliga stórari jólasølu**

JÓLAHANDIL
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Við vaksandi arbeiðsloysinum fyrireikaðu fleiri handlar seg til minni jólasølu. Fleiri handlar hava keypt minni inn og roynt at hava bíligari vørur.

Men tað er ógvuliga ymist, hvussu jólahandilin hevur roynst.

– Eg haldi, at jólahandilin hevur verið í lagi, nøkulunda sum hann hevur verið hini árini, sigur Niels Mortensen, stjóri í SMS.

Hann talar vegna handlarnar í SMS sum heild.

Men handilin veldst nógv um, hvussu tollaksmessudagur fer at roynast, segði Niels Mortensen tollaksmessumorgun.

Fatanin hjá Niels Mortensen er tó, at tað hevur verið minni av spontanari sølu. Fólk fóru ikki í býin bara fyri at keypa okkurt til jóla. Tey høvdu avgjørt frammanundan, hvat tey ætlaðu at keypa í jólagávu.

– Men eg vænti, tað verður verri í januar og februar, tí fólk hava minni pengar í ár, sigur Niels Mortensen.

## Byrjaði seint

Kristianna Høgnesen í klædnahandlinum Vogue í miðbýnum í Havn letur illa at søluni nú til jóla.

– Tað má bara vera so, tá ið tað stendur soleiðis til í landinum, og tað merkja flestu handlar, sigur Kristianna Høgnesen.

Nakað verður kortini selt, tí hon hevur síni føstu viðskiftafólk.

Hon heldur annars, at jólahandilin í ár byrjaði nógv seinni enn undanfarin úr. Gongd kom ikki á fyrr enn leygardagin.

Tað merkist á jólahandlinum í Klaksvík, at har hevur verið stórt arbeiðsloysi seinasta árið.

## Gávuhandlarnir harðast raktir

– Her hevur gingið trekt, tað havi eg hoyrt fleiri handilsfólk siga, sigur Magnus Arge, formaður í Klaksvíkar Handilsfelag.

Hann heldur, at serliga gávuhandlarnir mertul minni sølu. Tað veit hann, tí hann hevur gávubúð sjálvur.

Handlarnir hava keypt minni inn og hava roynt at funnið bíligari vørur.

– Vit síggja tað væl, at tað gongur ikki væl at selja tær dýrari vørurnar, og at fólk hugsa segt betur um nú, hvat tey skulu keypa, sigur Magnus Arge.

Handlarnir hava ikki longur opið jólaaftan.

– Tað er ikki so galið at hava frí jólaaftan, men vit hildu tað vera hugnaligt at hava opið jólaaftan, tí tá komu so nógvir menn í býin at keypa ofta einastu gávuna, sum teir skuldu keypa. Og tá ið klokkan so slerdi tólv, var býurin fullkomiliga tómur fyri fólk, sigur Magnus Arge.

## Góðir dagar

Á Skálafjørðinum hevur gingið nógv betur.

Hans Olsen, sum er formaður í Handilsmiðdeplinum í Runavík og rekur klædnahandilin Trend Fllor veit ikki um so stóra jólasølu sum í ár. Sølan har byrjaði tíðliga í ár, og allir handlar, sum hann hevur tosað við, lata væl at.

– Eg havi havt nógv økta sølu og havi verið noyddur til fleiri ferðir at bílagt meira vøru heim, sigur Hans Olsen. Sum onnur handilsfólk bílegði hann í ár eisini bíligari vørur við minni keypiorkuni í huga.

Øktu søluna grundar hann á, at lítið arbeiðsloysi er á Skálafjørðinum, men tað koma eisini fólk bæði úr Havn og úr Klaksvík at keypa á Skálafjørðinum, har vøruúrvalið er eitt annað, og handlarnir bera orð fyri at hava bíligari vørur enn handlar eitt nú í Havn.

Nøkur handilsfólk, sum Sosialurin hevur tosað við, øsa seg um, at skipað verður fyri flogferðum av landinum at keypa, og at Norröna eisini gjørdi ein slíkan jólatúr. Tað hevur heilt vist tikið frá søluni í Føroyum, siga tey.